gult cyan magenta svart



# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og sum frálíður regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og seinnapartin regn ella ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind millum landnyrðing og útnyrðing og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.



# Gandar abstraktar myndir úr náttúruni

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Leygardagin letir upp framsýning í Listaskálanum við temperamálningum, glasmálningum og steinprentum,sum Tróndur Patursson úr Kirkjubø hevur málað og evnað til.

56 ára gamli Tróndur Patursson man vera ein hin kendasti listamaður við eiga. Og Tróndur er sera kendur uttanfyri landoddarnar. Hann fær tey bestu ummælini í donskum og útlendskum bløðum. Fyrst og fremst eru tað verkini hjá Tróndi, sum fólk leggja merki til. Men Tróndur sjálvur hevur eina velduga útstráling og hann vísir seg neyvan á eini framsýning uttanfyri landoddarnar, uttan at myndamenn og tíðindamenn eru eftir honum og seta hann stórt upp í bløðunum.

Tróndur er so deiliga erligur í síni myndatalu. Tað er einki at ivast í, at myndatilfarið er tikið beint úr gerandisdegi listamannsins. Sama ger um hann rekist á einum skirvisligum flaka úti á heimshøvunum, um hann hongur í berginum í Trøllhøvda ella um hann hvílir trygt í fanginum á konuni heima í Kirkjubø.

Ella sum ein danskur blaðmaður skrivaði um Trónd einaferð: »Han har oversat sin naturoplevelse til abstrakt billedskrift. Tróndur Patursson vil gøre det usynlige synligt., bringe os i berøring med en realitet, som overstiger vore sansers formaaen og som vort intelllekts bergrænsede fatteevne heller ikke magter at fastholde.«




Lágtrýstið vestanfyri Føroyar grynnist, men lágtrýstið vestanfyri Ísland fer í landnyrðing.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum seinnapartin.




**Hitalagið mált frá 13./09. kl 06[00]–14./09. kl 06[00]. Hitin í gjár: 10,3°C**
Minsti hiti máldur í september: **÷0,5°** Mesti hiti máldur í september: **19,5°**




Avfallið: 3,3 mm – **mált frá 13./09. kl 6[00]–14./09. kl 06[00]**
Avfallið higartil í september: 35,7 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannahavn | 13 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | – |
| Paris | 21 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 28 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 10 |

## Vestfalskyrrindi

8. sept.: Mánin longst frá jørðini
13. sept.: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. sept. | 08.10 | 20.26 | 07.10 | 19.26 | 07.25 | 19.41 | 10.10 | 22.26 | 11.10 | 23.26 | 06.25 | 18.41 | 05.25 | 17.41 | 08.25 | 20.41 | 09.25 | 21.41 | 07.55 | 20.11 | 09.10 | 21.26 |
| 16. sept. | 08.42 | 20.59 | 07.42 | 19.59 | 07.57 | 20.14 | 10.42 | 22.59 | 11.42 | 23.59 | 06.57 | 19.14 | 05.57 | 18.14 | 08.57 | 21.14 | 09.57 | 22.14 | 08.27 | 20.44 | 09.42 | 21.59 |
| 17. sept. | 09.16 | 21.33 | 08.16 | 20.33 | 08.31 | 20.48 | 11.16 | 23.33 | – | 12.16 | 07.31 | 19.48 | 06.31 | 18.48 | 09.31 | 21.48 | 10.31 | 22.48 | 09.01 | 21.18 | 10.16 | 22.33 |
| 18. sept. | 09.51 | 22.11 | 08.51 | 21.11 | 09.06 | 21.26 | 11.51 | – | 00.33 | 12.51 | 08.06 | 20.26 | 07.06 | 19.26 | 10.06 | 22.26 | 11.06 | 23.26 | 09.36 | 21.56 | 10.51 | 23.11 |

Kelda: Skipalistin 2000